# ÍF hevur fingið pappír upp á Bartal

**Í Fuglafirði siga teir seg nú hava styrkt liðið so nógv, sum teir ætlaðu at gera tað, nú teir aftur skulu royna seg í bestu deildini**

ÍF FYRIREIKINGAR
*Jóannes Hansen*

Tað hevur leingi ligið á ljóði, og nú er tað veruleiki. Sunnukvøldið skrivaðu ÍF og Bartal Eliasen undir sáttmála, sum ber við sær, at Bartal nú aftur er ÍF fótbóltsspælari. Hann hevur spælt flogbólt í felagnum í øll árini, men tey seinastu árini hava evnini sum fótbóltsspælari verið nýtt í GÍ og Gøtu.

Í Fuglafirði eru teir væl nøgdir við, at Bartal aftur er komin í barndómsfelagið, og teir siga seg nú vera komnar á mál í manningarligu fyrireikingunum til nýggja kappingarárið.



Bartal Eliasen fer komandi árið at spæla við ÍF, sum soleiðis hevur fingið tilgongd av fimm leikarum, nú liðið aftur skal royna seg í bestu deildini

Umframt Bartal Eliasen er hópurin styrktur við fýra øðrum spælarum, sum ikki spældu við ÍF í fjør. Teir eru Bárður á Lakjuni, Magni á Lakjuni, Rúni Elttør og Karstin Joensen. Eins og Bartal er Bárður komin til barndómsfelagið, eftir at hann hevur spælt við GÍ. Magni, sum eisini er uppvaksin í Fuglafirði og ÍF, spældi í fjør við EB/Streymi, Rúni spældi við B36, og Karstin Joensen var í fjør málverji hjá KÍ.

Tað ljóðaði eina ferð, at Viggo Johannesen, sum seinnu árini hevur verið fastur fúsur í miðverjuni, ikki skuldi spæla við ÍF í ár, men í staðin skuldi spæla við øðrum felag. Nú er greitt, at Viggo aftur í ár fer at spæla við ÍF.

Sigfríður Clementsen fer at halda fram sum venjari hjá ÍF, og Bogi Lervig verður hjálparvenjari.

### Ivi um Bárð

Í fjør var Bárður á Lakjuni einasti spælarin hjá GÍ, sum var við í øllum átjan dystunum. Hann var hvørja ferð ímillum teir fyrstu ellivu. Undanfarnu árini hevði Bárður verið nógv darvaður av skaðum í knøunum. Hóast hann spældi alla tíðina í fjør, so var ikki frítt, at skaðarnir plágaðu. Síðani kappingarenda hevur Bárður aftur verið skaðaplágaður, og um vend ikki kemur í, so er møguleiki fyri, at hann ikki fær spælt soleiðis, sum hann gjørdi í fjør.

– Vit vilja fegnir hava, at Bárður verður førur fyri at spæla, tí vit rokna hann at fara at verða ein av stuðulsspælarunum. Hann hevur jú royndirnar í bestu deildini, sum fleiri av hinum ikki hava. Tí fara vit at gera okkara til, at Bárður kann fáa alla ta viðgerð og hjálp, sum tað ber til at fáa, sigur Rógvi Róin, sum vegna ÍF hevur samráðst við spælararnar.

# Heimstoppurin móti Føroyum

**Føroyska manslandsliðið fær helst størstu avbjóðingina nakrantíð, tá teir á útivølli skulu royna seg móti Noreg**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Mánakvøldið legði føroyski landsliðshópurin í hondbólti leiðina til Noreg, har teir mikudagin skulu spæla fyrsta HM-undankappingardystin á hesum sinni.

Fyrireikingarnar til hetta hava verið ígongd í longri tíð, og millum jól og nýggjár vórðu fýra dystir leiktir á eini venjingarferð til Letlands. Fýra dystir, sum eftir øllum at døma komu væl við hjá liðnum.

- Eg haldi í øllum førum, at talan var um sera hóskandi mótstøðu. Vit møttu liðum, sum vóru nakað betri enn vit, men hinvegin ikki so nógv betri, at talan gjørdist um bank, sigur Hjalmar Klein Olsen.

Víðari sigur hann, at einasta fráveran til dystin móti Noreg verður vanligi liðskiparin, Ingi Olsen.

- Ingi hevur drigist við ein skaða, og sunnukvøldið varð so avgerð tikin um, at hann ikki verður við á ferðini. Vónin er so, at vit hava hann tøkan til heimadysti móti Noreg leygardagin, men tað fáa vit so at síggja. Hinvegin eru Heini Hanusarson, Janus Einar Sørensen og Eli Müller allir tøkir, eftir at teir hava drigist við nakrar smærri snuddir, so alt í alt eru vit so væl fyri, sum tað nú einaferð er gjørligt, heldur Hjalmar.



Heini Joensen hevur havt trupulleikar við tummilfingrinum, men roknað verður tó við, at hann verður førur fyri at spæla, tá føroyska landsliðið skal royna seg móti norsku risunum

### Lið í heimsflokki

Men eitt er, hvørjar leikarar okkara landslið hevur tøkar. Annað - og kanska meira týdningarmikið í hesum føri – er hvørjar leikarar mótstøðan hevur at taka av.

Og tað er ikki smávegis. Onkursvegna megnaði Noreg at klodda EM-luttøkuna burtur seinast, tá teir taptu fyri Portugal í seinasta undankappingardystinum, og tí noyðast teir aftur hesaferð at taka lut í undankappingini. Men síðani hetta hava teir so dyggiliga staðfest, at teir eiga at teljast við, tá heimsins sterkastu hondbóltstjóðir verða nevndar.

Eitt nú hava teir hetta seinasta árið givið danska landsliðnum sannan bank, og eisini hava teir vunnið á heimsmeistarunum úr Kroatia, so føroyingar hava í øllum allar hugsandi orsøkir til at sýna størstu virðing fyri mótstøðuni.

Hjalmar dylir heldur ikki fyri, at talan kann gerast um eitt stórt trýst, sum kemur móti føroyska liðnum, men hinvegin tykist hann ikki at óttast uppgávuna sum so.

- Hyggur tú at liðnum hjá teimum, so er tað bara ein leikari, sum er úr norsku kappingini, meðan restin spælir í eitt nú Spania og Týsklandi, so tað er einki at fara skeivur av, at talan er um sterkar leikarar. Úrslitini seinasta árið tala eisini fyri seg, og í veruleikanum hava teir helst einki at gera í slíkari undankapping, og tað vilja teir helst eisini prógva.

- Tað, sum helst verður størsti trupulleikin hjá okkum, er ferðin, sum teir eru førir fyri at spæla í, og skrúva teir hesa heilt upp, so verður tungt hjá okkum. Serliga er væntandi, at teir spæla við høgari ferð fyrstu løtuna, men hinvegin kunnu vit altíð vóna, at teir undirmeta okkum eitt sindur, soleiðis at vit hóast alt fáa okkurt orðið at siga.

Hvussu er og ikki, so skal dysturin spælast, og einki er at ivast í, at onkra staðni í Føroyum eru sjónvarpstólini tendrað. Norska TV2 vísir nevnliga dystin forskotið, og byrja teir kl. 20 við hesum. Útvarp Føroya er annars eisini á staðnum, og teir fara so í luftina um 7'tíðina mikudagin við beinleiðis frásøgn.

Føroyska landsliðið kemur aftur til Føroya hósdagin seinnapart, og so er at vóna, at nakað av krúti verður eftir, tá teir leygardagin skulu spæla seinna dystin móti Noreg.



# NM stendur Føroyum í boði

**Um U–17 landsliðini skulu dystast í Føroyum fyrstu vikuna av august valdast um, um FSF nú beinanvegin fær grønt ljós fyri at hýsa ferðaløgunum**

NM FYRI U–17
*Jóannes Hansen*



Tað stendur Fótbóltssambandi Føroya í boði at vera vertur fyri NM kappingina fyri U–17 landslið. FSF hevur havt tilboðið tveir teir síðstu mánaðirnar, men enn hava teir ikki givið hinum Norðurlondunum endalig boð, um kappingin verður í Føroyum ella ikki.

– Eingin ivi er um, at tað telur rætta vegin fyri FSF og føroyskan fótbólt sum heild, um vit taka sovorna stóra uppgávu á okkum. Fótbóltssambandið er áhugað í at skipa fyri kappingini, og vit kenna okkum at vera førar fyri tí. Hetta er ikki nakað nýtt, tí vit hava áður skipað fyri sovornum kappingum, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum.

Ísak Mikladal sigur, at orsøkin til, at teir ikki enn hava givið endalig boð, um teir fara at taka uppgávuna á seg ella ikki, er, at teir ikki enn hava fingið staðfest, um teir fáa hýst ferðaløgunum, sum skulu koma henda vegin.

– Vit bíða eftir svari frá Hotel Føroyum. Tá ið vit fyrstu ferð spurdu okkum fyri, fingu vit at vita, at tað bar ikki til hjá teimum at hýsa so nógvum fólkum frá 1. og til 8. august, men at tað bar til frá 2. og til 9. august. Vit spurdu okkum fyri hjá hinum londunum, um tað bar til at flyta kappingina ein dag. Tað vísti seg ikki at vera nakar trupulleiki. Síðani hava vit biðið Hotel Føroyar um at staðfesta, at teir kunnu hýsa fótbóltsgestunum, men higartil hava vit ikki fingið staðfestingina frá teimum. Nú gongur tíðin undan, og vit mugu hava svar nú beinanvegin, um vit skulu taka uppgávuna á okkum, sigur Ísak Mikladal.

### Finnland bar seg undan

Upprunaliga var ætlanin, at Finnland skuldi vera vertur fyri NM kappingini fyri U–17 landslið. Men í heyst bóðu finnar um, at onkur annar tók uppgávuna á seg. Tí var tað, at FSF fekk hetta tilboðið.

Orsøkin til at Finnland hevur biðið um at sleppa undan vertsskapinum, sigur Ísak Mikladal vera, at Finnland hesar seinastu mánaðirnar hevur fingið fleiri aðrar kappingar, sum teir skulu standa fyri. Eitt nú skulu teir vera vertir fyri endaspælinum fyri U–19 kvinnurnar. Tí vildu teir sleppa undan U–17 kappingini í hesum umfarinum.

### Eisini í Eysturoy

NM kappingin fyri U–17 landslið er á skránni fyrstu vikuna av august á hvørjum ári. Norðurlond og Ongland, sum eru við á hvørjum ári, skiftast um at standa fyri kappingini. Umframt Ongland, Danmark, Finnland, Svøríki, Noreg, Føroyar og Ísland verður eitt land afturat bjóðað við á hvørjum ári. Skotland hevur fleiri ferðir verið við, og eitt nú Holland hevur eisini verið við. Tað er upp til vertstjóðina at bjóða síðsta landinum við, og Ísak Mikladal heldur, at tað hevði kanska verið eitt hugskot, at føroyingar bjóðaðu Írlandi við, nú Føroyar og Írland eru í HM undankappingarbólki saman.

Tá ið NM fyri U–17 landslið var í Føroyum fyri sjey árum síðani, vórðu allir dystirnir spældir í Havnini. Ísak Mikladal sigur, at FSF hevur treytað sær, at um kappingin verður í Føroyum í summar, so skulu dystir hesa ferð kunna spælast upp til 80 kilometrar burtur frá, har sum ferðaløgini fara at halda til. Hetta er ikki óvanligt aðra staðni, sigur hann.

– Vit hava hugsað okkum, at tað umframt í høvuðsstaðnum eisini skal spælast á onkrum av fleiri nýggjum graslíkisvallum í Eysturoy, sigur Ísak Mikladal, sum væntar og vónar, at FSF í hesi vikuni kann boða frá, at tað verður møguleiki at hava NM kappingina fyri U–17 landslið í Føroyum. Tá ið kappingin seinast var í Føroyum, vóru allir dystirnir spældir í Gundadali.

# VB í hálvfinaluni

Kvinnurnar hjá VB gjørdust seinasta liðið í hálvfinaluni í Coca-Cola kappingini hjá kvinnum. Hetta var greitt leygardagin, tá seinasta fjórðingsfinalan í kappingini varð avgreidd.

Upprunaliga hevði HSF ásett, at dystirnir skuldu leikast fyri nýggjár, men tá Neistin kortini skuldi suður nú fyrsta vikuskiftið í nýggja árinum, samdust liðini bæði og HSF um, at dysturin eins væl kundi bíða til hetta.

Endaliga úrslitðið av dystinum gjørdsti 34-30 til VB, eftir at tær í hálvleikinum høvdu verið á odda við 18-14.

Soleiðis eru tað VB, VÍF, Stjørnan og Kyndil sum skulu stríðast um tey bæði plássini í finaluni.

**- jm**



VB tryggjaði sær leygardagin, at tær eru í pottinum, tá dragast skal um, hvussu hálvfinalurnar skulu leikast

*Mynd: Áki Bertholdsen*

## Jóhannis í B36

Sum vit áður hava nevnt, so vóru leingi greiðar ábendingar um, at landsliðsleikarin, Jóhannis Joensen, í 2004 fór at spæla við B36.

Jóhannis hevur havt sáttmála við FS Vágur, men nú hesin sáttmálin er um at renna út, er tað staðfest, at ætlaða skiftið er veruleiki.

Hetta er fyrstu ferð, at verjuleikarin fer at royna seg í B36. Undan hesum hevur hann spælt fyri heimstaðarfelagið úr Vágum, eins og hann í fleiri ár var partur av liðnum hjá HB, har hann eisini tvær ferðir hevur verið við til at vinna gull í FM-kappingini.

**- jm**

